UTTAN ÚR HEIMI

# Meiri enn 100.000 deyð og fleiri milliónir í neyð



*Vanlukkan í Suðurasia hevur rakt fleiri milliónir fólk, og mong teira hava mist hús og heim.*

**Alt bendir á, at flóðaldan í Suðurasia hevur kravt meiri enn 100.000 mannalív. Harafturat hava fleiri milliónir mist hús og heim**

FLÓÐALDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár kom talið á deyðum aftan á flóðalduna í Suðurasia upp ímóti 90.000, men altjóða hjálparfelagsskapir ivast ikki í, at tað fer at veksa uppaftur meiri. Teir vísa á, at í Indonesia hevur flóðaldan kravt nógv fleiri mannalív enn upprunaliga hildið, serliga í landspartinum Aceh. Tey mest dapurskygdu siga, at bara í Indonesia kann flóðaldan hava kostað umleið 80.000 mannalív.

Eitt annað er, at hernaðarstýrið í Burma hevur verið sera afturhaldandi við upplýsingum um, hvønn skaða flóðaldan gjørdi har, men hjálparfelagsskapirnir ivast ikki í, at fleiri túsund fólk á teimum burmesisku oyggjunum hava latið lív.

Altjóða samfelagið er farið undir eitt ovurstórt hjálpar- og bjargingarátak. Nógv lond hava játtað pening og sent hjálparfólk til tey raktu økini, og nógvir hjálparfelagsskapir hava sent nógv fólk hagar at hjálpa myndugleikunum.

Heimsheilsustovnurin WHO hevur ávarað um, at vandi er fyri farsóttum, sum kunnu krevja líka nógv mannalív sum sjálv flóðaldan. Vandin er serliga stórur, tí at drekkivatnið er dálkað nógvastaðni, og tí verður nú roynt at útvega fólki reint vatn og at finna reinar keldur.

Sambært WHO eru minst fimm milliónir fólk rakt av flóðalduni. Mong teirra eru vorðin heimleys og hava mist at kalla alt, sum tey áttu. Í fyrsta umfari ræður um at útrvega teimum vatn og mat og tak yvir høvdið. Serfrøðingar siga, at uppgávan er tann størsta, sum heimssamfelagið hevur havt í nýggjari tíð.

# Svøríki meint rakt

**Svensku myndugleikarnir sóknast eftir 1500 svium í teimum raktu økjunum, men tað veruliga talið kann vera tríggjar ferðir størri**

FLÓÐALDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógv tey flestu svensku ferðafólkini, sum leitað verður eftir, vóru í Teilandi, og sambært uttanríkisráðnum hava myndugleikarnir ikki hoyrt frá umleið 1.400 svium, sum hildu frí har. Harafturat koma umleið 100 fólk, sum vóru aðrastaðni í økinum, sigur uttanríkisráðið í Stockholm.

Men sambært teimum svensku ferðaskrivstovunum er tað ikki óhugsandi, at umleið 4.500 sviar vóru í teimum suðurasiatisku londunum, tá flóðaldan skolaði inn yvir londini.

Týskland beyð sær fyrradagin til at hjálpa svium. Aftonbladet skrivar, at Gerhard Schrøder, kanslari, ringdi til Gøran Persson, forsætisráðharra og beyð honum at læna tvey stór flutningsflogfør frá týska flogvápninum. Gjáramorgunin bað svenska stjórnin eisini Bretland og USA um hjálp.

Svensku myndugleikarnir hava gjørt av, at dagurin í morgin, nýggjársdagur, skal vera almennur syrgidagur til minnis um tey, sum hav latið lív í flóðalduni. Flaggað verður í hálvari stong um alt landið, og í kirkjunum verður biðið fyri teimum farnu. Í gjár var bønarhald í dómkirkjuuni í Stockholm, har kongshjúnini, stjórnin og floksformenninir luttóku.

Eitt tilsvarandi bønarhald var í dómkirkjuni í Oslo fyrrakvøldið fyri teimum, sum doyðu í flóðalduni.

## Vandamikið at gera flatskerm

Japanskir granskarar vilja vera við, at tey sum arbeiða á verksmiðjum, ið gera sjónvørp við flatskermi, kunnu fáa varandi mein av arbeiðinum.

Kanningar hjá granskarunum hava avdúkað, at ein 30 ára gamal maður, sum hevur arbeitt við at gera slíkar flatskermar, hevur fingið eina álvarssama lungnasjúku. Í lungum hansara funnu granskararnir smáar bitar av tí metallinum, sum verður lagt á skermarnar, og sambært BBC hevur hetta metallið fyrr kostað fólki lívið.

Flatskermar eru vorðnir sera væl umtóktir, og bretskir granskarar siga, at tann vanligi brúkarin fær ikki mein av at hava eitt sjónvarp við flatskermi í stovuni. Teir vísa á, at skermarnir verða gjørdir í Fjareystri, og at teir eru púra tættir, tá teir koma á tann evropeiska marnaðin.

## Vænta val í apríl

Í Bretlandi væntar blaðið Evening Standard, at Tony Blair, forsætisráðharri, fer at skriva út val í vár, og at valið helst verður tann 21. apríl. Ein talsmaður hjá Blair sýtir fyri at gera viðmerkingar til tíðindini. Hann sigur, at tað er bara forsætisráðharrin sjálvur, sum veit nakað um valdagin.

Blair hevur verið í Egyptalandi og hildið frí ta seinastu vikuna. Tað hevur fingið øði í andstøðuna, sum vil vera við, at forsætisráðharrin hevur fingið tilboð um ókeypis uppihald í Sharm el-Sheikh við Reyðahavið. Sambært andstøðuni er hetta ikki fyrstu ferð, at Blair hevur tikið av slíkum tilboðum. Eitt nú skal hann fyrr hava fingið tílík tilboð frá italska forsætisráðharranum, Silvio Berlusconi, og frá sangaranum Cliff Richard.

Skrivstoan hjá Blair avsannar, at forsætisráðharrin hevur fngið eina ókeypis fer til Sharm el-Sheikh. Hann hevur sjálvur goldið ferðina, sigur skrivstovan.

## Hava illgruna til IRA

Myndugleikarnir í Norðurírlandi hava illgruna um, at tað var IRA, sum rændi meiri enn 400 milliónir krónur úr bankanum Northern Bank í Belfast nakað fyri jól.

Vápnaðir løgreglumenn hava seinastu dagarnar rannsakað húsini hjá fleiri leiðandi limum í IRA, men løgreglan vil ikki siga, um hon hevur funnið nakað, sum kann seta IRA í samband við ránið. Leiðslan í IRA vísir aftur, at felagsskapurin hevði nakað við ránið at gera.

Løgreglan heldur kortini, at tað var IRA, sum rændi bankan, og at ætlanin er at brúka pengarnar til at gjalda limum í IRA pensjón. Tað er alment kent, at nógvir limir í IRA eru misnøgdir við, at leiðararnir tykjast hava nóg mikið av pengum um hendi, meðan teir vanligu limirnir mugu stríðast hvønn dag fyri at fáa endarnar at røkka saman. Løgreglan ávarar samstundis um, at tað er ikki óhugsandi, at IRA fer at brúka ein part av pengunum til at keypa vápn fyri.

## Meksikanar ov feitir

Ongastaðni í heiminum líða so nógv fók av ovurfiti sum í USA og Meksiko, men nú hava meksikonsku myndugleikarnir sett sær fyri at gera nakað munagott við hendan trupulleikan.

Kanningar hava víst, at 35 prosent av teimum meksikonsku kvinnunum líða av ovurfiti. Hjá monnunum er støðan uppaftur verri, tí 55 prosent av teimum eru ov feitir. Kanningarnar vísa, at tað eru serliga fólk í teimum stóru býunum, sum hava trupulleikar av fiti. Orsøkin er, at fólk koyra til og frá arbeiði hvønn dag, og at tey eta ósunnan mat. Eisini hevur tað víst seg, at í fjør drakk hvør einasti meksikani meiri enn 100 litrar av cola.

Meksikanskir læknar hava leingi ávarað ímóti gongdini. Teir vísa millum annað á, at 6,5 milliónir meksikanar hava diabetis, og tað er meiri enn í nøkrum øðrum landi í heiminum samanborið við fólkatalið.